# Fleiri royndir áðrenn vit taka avgerð um kaikant



*Magne Arge, er formaður i Oljuvinnufelagnum, sum ikki heldur tað vera rætt her og nú at avtaka krøvini til kaikantin.*

**-Tess fleiri royndir vit gera okkum, og tess størri førleika vit hava í oljuvinnu, tess betur eru vit før fyri at taka røttu avgerðinar - eisini viðvíkjandi um tað er rætt at varðveita kaikantin í lóggávuni ella ikki - tá tann tíðin kemur sigur Oljuvinnufelagið í viðmerking til úttalilsini, sum hava verið frammi um, at kaikanturin eigur at takast av**

OLJA OG KAIKANTUR
*Jan Müller*

Spurningurin um í hvønn mun útlendsku oljufeløgini skulu verða tvungin til at brúka føroyskan kaikant í sambandi við oljuleiting er frammi av og á. Eitt nú hava fleiri framstandandi persónar úttalað seg ímóti hesum kravi ella sett spurnartekin við tað. Teirra millum hava verið formaðurin í Búskapargrunninum, Herman Oskarson og stjórin í føroya Sparikassa, Bjarni Olsen.

Bjarni Olsen, stjóri í Føroya Sparikassa, tók málið fram í sambandi við viðgerðina av fíggjarlógini fyri 2002. og nevndi í útvarpinum herfyri, at tann parturin av oljulóggávuni, sum sigur, at alt skal um føroyskan keikant skal avtakast. Sparikassikassastjórin heldur, at trýstið á føroyska búskapin er um at gerast ov stórt.

Sambart heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum kann Oljuvinnufelagið ikki taka undir við hesi útmeldiningi hjá sparikassastjhóranum.

Har stendur m.a. : Um hugt verður eftir næstu nógvu árunum, verður trýstið á búskapin og arbeiðsmarknaðin hvørki størri ella minni, um kaikanturin verður tikið úr lógini.

Vavið á virkseminum, sum føroyskar fyritøkur tóku lut í fyrsta leitiskeiðnum eftir olju, var ikki stórt. Virksemið kann ikki so frægt sum samanberast við eina hampuliga byggiverkætlan, sum til dømis landssjúkrahúsið ella tá Sparikassin bygdi um úti við Strond. Í ár vóru tríggjar royndarboringar, næsta ár verður ein og í 2003 verða væntandi tríggjar royndarboringar.

Tað hevur havt sera stóran týdning fyri menningina av førleika í føroyskari vinnu, at virksemið var skipað út úr Føroyum og at føroyskar fyritøkur tóku lut. Einasti mátin at fyrireika okkum betur til avbjóðingarnar í eini viðvarandi oljuvinnu er júst við at taka lut í virkseminum kring oljuleitingarnar sigur Oljuvinnufelagið og heldur fram:

-Ein oljuleiting í Føroyum er ikki so stór í vavi, at hon ávirkar arbeiðsmarknaðin munandi. Ikki fyrr enn føroyingar finna olju í rakstrarverdum nøgdum, og tí skulu til at byggja út og framleiða, kemur oljuvinnan at fáa ávirkan á búskapin og arbeiðsmarknaðin í størri mun.

Men enn vita vit ikki um ella nær so verður. Tað kunnu saktans ganga fleiri ár. Og búskaparligu royndirnar seinastu 10 árini siga okkum, at eftir fáum árum kann mangt broytast í einum fiskivinnubúskapi sigur Oljuvinnufelagið og slær fast, at tess fleiri royndir vit gera okkum, og tess størri førleika vit hava í oljuvinnu, tess betur eru vit før fyri at taka røttu avgerðinar - eisini viðvíkjandi um tað er rætt at varðveita kaikantin í lóggávuni ella ikki - tá tann tíðin kemur sigur Oljuvinnufelagið í viðmerkingini. Formaður í Oljuvinnufelagnum er Magni Arge, sum eisini er stjóri í Atlantic Airways.

---

Fyrrverandi løgmálaráðharrin Hans Engell:

# Ognarrættur til ráevni sligin fastur við sjeytummaseymi



*Hans Engell: - Hans Engell sammetir útmeldingarnar hjá Tjóðveldisflokkinum um rættin til ráevnini við tey óhepnu politisku útspæl, sum eitt nú Dansk Folkeparti kemur við á fólkatingi. Hann heldur ikki, at handfaringin hjá Tjóðveldisflokkinum av hesum málinum gagnar tí góða tónanum millum bæði londini, sum tað nú verður lagdur so stórur dent á.*







*Tríggir forsætisráðharrar á rað, Poul Schlüter, Poul Nyrup Rasmussen og nú Anders Fogh Rasmussen hava gjørt greitt, at ráevnisavtalan millum Føroyar og Danmark frá 1992 kann ikki broytast. Hon er endalig.*

**– Ikki færri enn tríggjar danskar stjórnir hava púra klárt meldað út sína støðu. Føroyski ognarrætturin til ráevnini er sligin fastur við sjeytummaseymi fleiri ferðir, nú seinast av nýggja forsætisráðharranum. Og sama av samdum fólkatingi sigur Hans Engell, fyrrv. ráðharri**

RÁEVNI OG UNDIRGRUND
*Jan Müller*

Hans Engell var løgreglumálaráðharri í donsku stjórnini, tá Poul Schlüter, forsætisráðharri og Atli Dam, løgmaður undirskrivaðu avtaluna um ráevnini í føroysku undirgrundini. Hóast røddir hava verið frammi í bæði Danmark og Føroyum, sum sáa iva um veruliga virði av hesi avtalu, so hevur Hans Engell ikki verið í iva og er tað heldur ikki í dag, 10 ár eftir at avtalan varð undirskrivað. –Tað er eingin ivi um, at avtalan klárt og greitt sigur, at Føroyar eiga tær inntøkur, sum kunnu koma frá olju og gassi í undirgrundini. Ráevnini í undirgrundini eiga Føroyar.

-Nú hava serliga tjóðveldispolitikarar reist spurningin eitt nú til fólkatingsvalið, um ikki danir kunnu taka rættin til ráevnini aftur, tá tað hóvar teimum. Sagt verður, at ikki fyrr enn føroyingar eiga sjálva undirgrundina, eiga vit eisini rættin til ráevnini í henni.

Hans Engell: -Hatta haldi eg er at skapa eina øsing ella sum hann málber seg "det er at oppiske en stemning". Tí sjálvandi kunnu føroyingar eiga ráevnini uttan at eiga undirgrundina. Uttan mun til hvørja danska stjórn vit hava, so er tað á tí økinum givin so ein so greiður garantiur, at hetta kann ikki broytast aftur. Tað fer ongantíð at blíva valt eitt fólkating, sum verður sett soleiðis saman, at tann avgerðin kann broytast. Tað er útilokað. Tað verður ikki broytt nakað við henda politiska veruleika. So avgjørdur er fyrrverandi danski løgmálaráðharrin Hans Engell í spurninginum, sum møguliga fer at verða partur í føroyska valsstríðnum komandi.

Hann vísir á, at ikki færri enn tríggjar danskar stjórnir hava púra klárt meldað út sína støðu í hesum máli. Føroyski ognarrætturin til ráevnini eru sligin fastur við sjeytummaseymi fleiri ferðir, nú seinast av nýggja forsætisráðharranum.

Hans Engell sammetir útmeldingarnar hjá Tjóðveldisflokkinum um rættin til ráevnini við tey óhepnu politisku útspæl, sum eitt nú Dansk Folkeparti kemur við á fólkatingi. Hann heldur ikki, at handfaringin hjá Tjóðveldisflokkinum av hesum málinum gagnar tí góða tónanum millum bæði londini, sum tað nú verður lagdur so stórur dent á. - Við slíkum útmeldingum leggur Tjóðveldisflokkurin bara upp til eina illstøðu, sum als einki grundarlag er fyri í Danmark.